# Jákup fekk møguleikan ímóti Rosenborg



Jákup Mikkelsen fekk møguleikan – men noyddist fýra ferðir í meskarnar – tá Molde í fyrradagin spældi venjingardyst móti Rosenborg á La Manga

**Men hóast Molde hevði ikki so lítið av spælinum, so smurdu norsku meistararnir úr Tróndheimi teir av**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Meðan tað her á klettunum ríður um frostmarkið, og kavin – sum ein parsienna – rullar oman og niðan, so eru tað 14–15 stig í La Manga í Spania. Tað hevur m. a. við sær, at tað ber til at spæla fótbólt á góðum grasvallum á ibirisku hálvoynni, meðan umstøðurnar hjá føroyskum fótbóltsspælarum heima á klettunum og hjá teimum í hinum Norðurlondunum eru soleiðis, at spurningurin er, um fótbúnin skal vera skoytur ella fótbóltsstivlar.

Sum vit nevndu í gjár, so er landsliðsmálverjin Jákup Mikkelsen saman við liðfeløgunum í Molde á venjingarlegu í La Manga í Spania. Har eru fleiri norsk og svensk fótbóltslið saman við fleiri eysureuropeiskum feløgum.

Vit søgdu í gjár, at Jákup Mikkelsen var á beinkinum, tá Molde í fyrsta dystinum, sum var mánadagin, spældi ímóti russiska Anzhi. Eddie Gustafosson vardi Molde málið, og úrslitið var málleysur javnleikur.

Í fyrradagin var næsti dysturin á skránni. Molde spældi ímóti norska meistaraliðnum Rosenborg. Hesa ferð gav Molde venjarin, Gunde Bengtsson, Jákupi Mikkelsen møguleikan millum stólparnar. Tað kunnu vit ikki tulka øðrvísi, enn at venjarin framvegis ikki hevur avgjørt, hvønn av teimum báðum málverjunum hann ætlar at hava í málinum, og hvønn hann ætlar at hava á beinkinum, tá kappingarnar í Noregi koma fyri. Jákup Mikkelsen hevur málverjutroyggjuna við eitt talinum á rygginum, meðan svenski kappingarneytin hevur troyggjuna við tólv talinum á rygginum. Men tað ber tað neyvan til at leggja so nógv í.

## Fýra ferðir í meskarnar

Spurningurin er so, um Jákup Mikkelsen mikudagin styrkti um sína støðu í telvingini um at gerast fyrsti málverji. Á frágreiðingunum frá dystinum, sum vit hava sæð á tveimum heimasíðum, verður sagt lítið ella rættari einki um avrikið hjá Jákupi.

Úrslitið var 4–1 til Rosenborg. Tróndheimararnir komu á odda í fyrsta minutti, og tað málið hevði Jákup Mikkelsen einki við at gera. Eftir at ein roynd hevði rakt stólpan, var ein av RBK álopsmonnunum fyrstur á returinum.

Molde hevði fyrsta hálva tíman yvirvág í spæli. Men mótsatt mótstøðumonnunum so høvdu teir sera ilt við at fáa úrtøku burturúr yvirváginí. Beinanvegin í 2. hálvleiki økti Rosenborg. Ta ferðina var talan um eitt brotsspark. Jákup Mikkelsen hevði einki við tað at gera, men teir í Molde vóru ikki nøgdir við dómin, sum teir mettu vera tunnan, sum tað plagar at vera tikið til.

Fyrrverandi liðfelagin hjá Toda Jónsson, Harald Brattbakk, økti til 3–0, tá ein tími var farin. Hann stútaði eitt innlegg í málið. Síðsta málið hjá RBK kom í síðsta minutti, og aftur var talan um innlegg úr borðinum og umseting úr fimm metrum. Í sovornum støðum verður ofta mett um, um málverjin átti at havt verið úti og tikið ella boksað bóltin burtur, men tað vita vit einki um í hesum førunum. Einasta Molde málið kom, tá tað restaðu trettan minuttir. Tað varð skorað uppá brotsspark.

Molde skal aftur í eldin í morgin. Tá verður mótstøðuliðið Örgryte. Svenska liðið vann mánadagin á Rosenborg, so talan verður um ivaleysa stóra mótstøðu hjá Molde. Um tað verður Jákup Mikkelsen ella svenski Eddie Gustafsson, sum fer at verja málið hjá Molde vita vit ikki, men tað frætta vit meiri um týsdagin.

# FCK ein afturat úr Suðurafrika

**Fótbóltsskúlin, sum felagið hjá Toda Jónsson hevur í Suðurafrika, hevur klækt fyrsta spælaran til donsku superliguna, og FCK vónar at fáa nógvar pengar burturúr**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Í fleiri europeiskum fótbóltsfeløgum er tað ein partur av rakstrarinntøkunum, at teir keypa fremmandar spælarar bíliga í vónini um, at tað skal eydnast at selja onkrar teirra víðari við vinningi.

Tá B68 í fjør spældi Intertoto Cup ímóti belgiska Lokeren hoyrdu toftamenn um hetta. Lokeren hevur ein miðvísan politikk á hesum økinum. Teir eiga fleiri afrikansk feløg. Tað er lætt at fáa spælarar til hesi feløgini, tí lønirnar eru hægri, enn tær eru í hinum feløgunum. Hetta hevur við sær, at tað ber væl til hjá Lokeren at halda eyguni við, um spælarar við serligum fótbóltsgávum koma í feløgini. Tá ein sovorðin støða tekur seg upp, so eru teir í Lokeren skjótir at fáa spælaran til Belgia. Har eru fleiri av hesum slagnum við til at hjálpa Lokeren, sum í løtuni er á fimta plássi í landskappingini. Og Lokeren selur so onkrar víðari til onnur europeisk feløg.

## Pengamaskinan

FCK hevur nógv jørn í eldinum. Eitt av hesum er fótbóltsskúlin í Port Elizabeth í Suðurafrika, sum teir hava havt í eini tvey ár. FCK rekur skúlan, tí teir vóna at finna fram til góðar fótbóltsspælarar, sum kunnu nýtast á liðnum í superliguni, og sum kanska kunnu seljast víðari, tá teir hava verið í Keypmannahavn eitt skifti. Harvið vónar FCK at fáa vinning burturúr. At tað í Suðurafrika eru evnaríkir spælarar, sum standa seg væl í europeiskum feløgum eru tað fleiri dømi um. Eitt av hesum er Zuma, sum spælir í FCK álopinum saman við Toda Jónsson.

Nú hevur FCK fingið fyrsta nætmingin úr fótbóltsskúlanum í Port Elizabeth og til Keypmannahavnar. Hann eitur Elrio van Heerden. Hann er átjan ára gamal, og hann er ikki stórur – 168 cm. Men talan skal vera um eitt avbera stórt talent, sum tað verður roknað við skjótt kann vera við í kappingini um framrættaða miðvallarplássið á besta FCK liðnum – har eru annars nógvir um boðið.

Ungi maðurin sigur seg vera so ovfarnan, at hann ivast í, um hann droynir ella ikki. Hann sigur seg altíð hava sæð serliga nógv í Zuma, og nú skal hann venja saman við og ivaleyst eisini spæla á liði saman við landsmanninum. Í hvussu so er inntil HM endaspælið hevur verið. Tá rokna teir við, at Zuma verður seldur, og FCK fer at fáa pengar – nógvar pengar – í kassan. Og tað vóna teir eisini – um eini tvey ár – at fáa fyri nýggja mannin, Elrio van Heerden.


LANDSVERKFRØÐINGURIN

**Arkitektur**

Søkt verður eftir arkitekti til arkitektadeildina á stovninum.
Arkitektadeildin er ein partur av almennu byggiumsitingini á Landsverkfrøðingsstovninum. Í løtuni starvast 4 fólk á arkitektadeildini. Arbeiðsøkið er vítt og fevnir um nýbygging, umbygging og viðlíkahald av almennum bygningum. Harafturat er arkitektadeildin ráðgevi hjá hinum deildunum á stovninum í sambandi við bygging av havnum og vegum. Deildin er nýstovnað, og tann ið settur verður, fer at luttaka í framhaldandi menning av deildini.

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna um bygningssýn og fyriskipan av umvælingar- og viðlíkahaldsarbeiðum, gerð av fíggjarætlanum, byggiharraráðgeving og byggiharravirki í sambandi við nýggjar byggiætlanir.

Arbeiðið ber í sær samskifti við stovnsleiðarar og brúkarabólkar, arbeiðstakarar, privatar ráðgevarar og við embætisfólk í aðalstýrunum.
Umsøkjarar skulu tí hava evni at samstarva viá fólk, sum umboða ymisk arbeiðs- og áhugaøki.

Stovnurin fer undir at seta í verk skrásetingar- og viðlíkahaldsskipan fyri almennum bygningum, og fer tann, ið sett/ur verður, at hava týðandi lut í hesum arbeiði.

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir royndum bygningsarkitekti við áhuga fyri fjølbroyttum uppgávum í samstarvi við onnur. Vit nýta Microsoft Office forrit. Kunnleiki til CAD er ein fyrimunur.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Arkitektafelag Føroya.

**Umsóknir**
Umsókn við lívsgongdarlýsing (cv), prógvum og møguligum ummælum verður at senda til Landsverkfrøðingsstovnin, postboks 78, 110 Tórshavn og skal vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 11. mars 2002. Merkið brævbjálvan "Arkitektur". Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast hjá Ole Jensen, á tlf. 311333, e-postur olj@lv.fo



Móttøka



Í sambandi við, at FSF-FORMAÐURIN
**Torleif Sigurðsson**
fer frá sum formaður, verður skipað fyri
***móttøku í Norðurlandahúsinum, leygardagin 23. februar kl. 13.00***

**Fótbóltsamband Føroya**



